SUMMARKAPPINGIN '09

# Fýra hepnir vinnarar í summarkappingini

**Summarkappingin hjá Sosialinum, sum hevði nakrar megnar vinningar at bjóða, hevði stóra undirtøku millum lesarar blaðsins**

SUMMARKAPPING
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Hetta er fjórða árið á rað, at Sosialurin hevur havt eina stóra summarkapping í blaðnum. Hesaferð við vinningum, sum hava eitt samlað virði omanfyri 100.000 kr.

Í ár, eins og undanfarnu árini, hevur kappingin havt eina stóra undirtøku, og mett verður at umleið 2.000 lesarar hjá Sosialinum trúliga hava sitið og klipt puntarnar úr Sosialinum hesar fimm vikurnar, sum kappingin hevur verið í gongd. Tey hava límað á kalendarin, tey fingu tá kappingin byrjaði, og hava so sent kalendarin inn við øllum bókstavunum í vónini um, at just tey fóru at vera ein av teimum fýra hepnu vinnarunum í summarkappingini hjá Sosialinum.

Í gjár klokkan 14, vóru so teir hepnu vinnararnir av summarkappingini drignir í Miðlahúsinum, og varð hetta eisini kunngjørt á Rás2 í morgun. Seks fólk, og harvið vitni vóru til staðar, fyri at tryggja, at alt gekk fyri seg eftir bókini.

Talan var um fýra stórfingnar vinningar, sum tey sum hava vunnið kunnu verið stolt og fegin um at hava ognað sær. Tvær kvinnur á bygd vunnu 10 ferðir 10 ferðaseðlar frá Atlantic Airways, meðan tvær kvinnur úr Suðurstreymoy vunnu ávikavist eina Mitsubishi hitapumpu frá Demich og ein 2,9 cm tunnan flatskerm frá EL-IN. Og við so stórfingnum vinningum, var tað sjálvsagt, at summarkappingin fekk eina so stóra undirtøku.



## Vinningar:

**1**
10 x flogferðaseðlar frá Atlantic Airways - virði kr. 35.000
Vinnari: **Sarita Funn, Byrgisvegur 13, 350 Vestmanna, tel. 424446**

**2**
10 x flogferðaseðlar frá Atlantic Airways - virði kr. 35.000
Vinnari: **Anna Debes, Hornavegur 8, 450 Oyri, tel. 422534**

**3**
Mitsubishi hitapumpa frá Demich – virði kr. 15.900
Vinnari: **Agnas Hansen, Støðlatún 9, Argir, tel. 314658**

**4**
Samsung Led 2,9 cm tunnur flatskermur v/upphangi frá el-in – virði kr. 15.000
Vinnari: **Barbara Danielsen, Skræddaragøta 18, 188 Hoyvík, tel. 219969**



Bunkin við plátum frá Summarkappingini var ovurhonds stórur. Fleiri enn 2.000 lesarar hjá Sosialinum hava í summar tikið lut í summarkappingini